

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 10 - 2011

# Deyði Gaddafis ávirkar ikki oljuprísin

Hóast Libya er eitt av teimum heilt stóru oljulondunum, hevur tað ikki ávirkað oljuprísin á heimsmarknaðinum, at landsins leiðari tey seinastu 42 árini, Muammar Gaddafi, er deyður. Og deyði hansara fær væntandi heldur onga ávirkan á prisin. Arne Lohman, sum er greinari hjá Danske Bank og serkønur í rávørumarknaðarviðurskiftum, sigur, at í sær sjálvum er tað gott fyri marknaðin, at kríggið er av. Hann vísir á, at teir seinastu mánaðirnar er næstan eingin olja komin úr Libya, men nú fer landið væntandi aftur undir framleiðsluna. -Hinvegin kunnu vit ikki vænta nakað stórvegis prísfall, sjálvt um libyska oljan kemur aftur á marknaðin, sigur Arne Lohman við danska kringvarpið. Hann væntar, at onnur lond og serstakliga Saudiarabia fara at minka sína framleiðslu, so hvørt sum tann libyska veksur. Saudiarabar skrúvaðu eitt sindur meiri frá í summar, men nú fara teir at skrúva eitt sindur fyri aftur, sigur greinarin hjá Danske Bank við DR. Bretska blaðið The Guardian vil vera við, at kappingin um tær gevandi avtalurnar um libysku oljuna er longu byrjað. Eitt nú ætlar bretska BP sær ein part av køkuni, skrivar blaðið.

